Fyrr í syndamyrkri, G-d

      G                          C                     G
1 /4 Fyrr í syndamyrkri sál mín bundin var,
D7                        A7                     D7
Tonkti ei á Jesus, hann sum hjálpti mær;
G                          C                   G
Men tá hann í náði loysti mær øll bond,
D7                                               G
Kendi eg ta gleði, eg fekk av hans hond.

Niðurlag:
D7                      G
Á, so undurfult, á, so undurfult –
G                                    A7                     D7
Hjarta mítt í myrkri lá, men nú tað ljós fekk sjá.
G                                               C           G
Eldur Heilag´andans brennur nú í míni sál,
D7                                                   G
Og eg veit, at skjótt hann førir meg á mál.

2/4 Tá við hvørt í djúpa dali gangi eg,
Og í hjarta mínum sorgin nívir meg,
Rópi eg: "Á Harri, loys tú mær øll bond",
Skjótt tá skal eg kenna Jesu sterku hond.

3/4 Satans megi ofta møtir mær á jørð,
Men tá eg so sveiggi Andans hvassa svørð,
Førir tað til málið, frí tá er mín sál,
Leiddur av Guds hond, ið førir meg á mál.

4/4 Ofta tá eg troyttur foldum eri á
Veit at eg har heima, Jesus mín skal sjá.
Fram á himmalvegin Jesus leiðir meg.
Í Guds Anda "Abba Faðir" rópi eg.

Ums. Úr svenskum J. P. J.